| Felag | Føroya Arbeiðsgevarafelag |
|---|---|
| Høvundur | Páll Holm Johannesen, ráðgevi |
| Dato | Juli 2024 |

NOTAT

# Føroysk marknaðaratgongd

Føroya Arbeiðsgevarafelag spyr javnan útflutningsfyritøkur í Føroyum um teirra tørv á marknaðaratgongd úti í heimi. Seinastu ferð føroysku fyritøkurnar vórðu spurdar, var í 2021. Støðan í heiminum er nógv broytt seinastu árini, og tí hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag tikið stig til eina nýggja spurnakanning.

Hesaferð vóru 21 fyritøkur, sum útflyta teirra vørur og tænastur, spurdar um teirra tørv á marknaðaratgongd. Talan er um fyritøkur í vinnugreinunum alivinna, uppsjóvarvinna, botnfiskavinna, sjóvinna og kt-vinna.

## 1. Samandráttur

Føroyar útfluttu í 2023 vørur fyri 12,7 milliardir krónur og í 2022 útfluttu vit tænastur fyri 3 milliardir krónur. Við størri og betri marknaðaratgongd bøta vit munandi um møguleikarnar at fáa ein betri prís fyri okkara útflutning – øllum samfelagnum at gagni. Fyri hvørt prosent sum okkara miðal søluprísir økjast, gevur tað føroyska samfelagnum uml. 150 milliónir krónur í eyka inntøkum um árið.

Spurnakanningin staðfestir, at føroyskar fyritøkur vilja hava fleiri og betri møguleikar at útflyta sínar vørur og tænastur. Á summum marknaðum hava vit kappingarførar treytir, men fyritøkurnar vísa á, at tær á nógvum marknaðum hava verri - í ávísum førum nógv verri - treytir at útflyta teirra vørur og tænastur enn teirra nærmastu kappingarneytar. Innan vøruútflutning ger hetta seg serliga galdandi fyri alilaks og uppsjóvarfisk á ymiskum marknaðum. Av somu orsøk vilja føroyskar fyritøkur fáa betri atgongd til stóru asiatisku marknaðirnir, serliga Kina, Suðurkorea, Japan og India.

Føroyskar útflutningsfyritøkur, serliga innan saltfiskavinnuna, vilja eisini sleppa at útflyta fisk til Brasil, sum er fólkaríkasta landið í Suðuramerika. Brasilski marknaðurin fyri saltaðar fiskavørur er bæði stórur og góður, og tí seta fleiri føroyskar fyritøkur sína vón til, at heilsufrøðiligu forðingarnar verða beindar av vegnum og tað skjótt gerst møguligt at útflyta fisk til Brasil.

Fyri føroyskar tænastuútflytarar er tað ein stór avbjóðing, at Føroyar hava so fáar tvískattasáttmálar við onnur lond. Tað eru serliga fyritøkur í sjóvinnuni sum gera vart við henda trupulleika. Hetta forðar føroysku vinnuni at taka kappingina upp við sínar útlendsku kappingarneytarnar um arbeiði uttanlands. Teirra greiða áheitan er tískil at stig verða tikin til at fáa fleiri tvískattasáttmálar í lag.

## 2. Vøruútflutningur

Føroyar hava í løtuni handilssáttmálar við ES, Stórabretland, Turkaland og EFTA-londini Ísland, Noreg og Sveis. Seks sáttmálar við tilsamans 32 lond. Høvuðsendamálið við handilsáttmálum er at taka burtur forðingar fyri samhandli innan ávísar vørubólkar og tænastur, sum partarnir kunnu semjast um til gagns fyri báðar partar. Hetta er munandi færri handilssáttmálar enn okkara kappingarneytar hava.

Sum myndin niðanfyri vísir, er virðið á samlaða føroyska vøruútflutninginum økt munandi síðani aldarskiftið. Í fjør táttaði vøruútflutningurin í 13 milliardir krónur.

*Mynd 1: Samlaða virðið á føroyska vøruútflutninginum 2000-2023*



Fiskavørur fylla nógv tann størsta partin av føroyska vøruútflutninginum. Síðani aldarskiftið hava fiskavørur vanliga staðið fyri yvir 90 prosent av samlaða útflutningsvirðinum av vørum.

*Mynd 2: Vøruútflutningur, fiskur og ikki fiskur, 2000-2023*



Vit hava býtt útflutningin fyri fiskavørur í fimm høvuðsbólkar. Hesir eru:

- Makrelur, sild og svartkjaftur
- Laksur og síl
- Toskur, hýsa og upsi
- Lýsi, fóður og fiskamjøl
- Aðrar fiskavørur

'Aðrar fiskavørur' umboða samlaðu útflutningsnøgdina fyri øll hini fiskasløgini, ið ikki eru í teimum fýra fyrst nevndu bólkunum.

Á myndini niðanfyri sæst, at útflutningsvirðið hjá hvørjum einstøkum bólki hevur sveiggjað nakað seinastu 30 árini. Bólkurin 'Laksur og síl' hevur havt størsta vøksturin seinnu árini. 2022 gjørdist besta árið nakrantíð, tá ið útflutningsvirðið fyri henda bólk var yvir 5,5 milliardir krónur. Seinastu nógvu árini hevur hesin bólkurin einans fevnt um laks.

Útflutningsvirðið fyri makrel, sild og svartkjaft er økt nógv síðani 2009. Vøksturin í útflutningsvirðinum hevur verið oman fyri 1 milliard krónur seinastu 10 árini. Seinnu árini er eisini útflutt munandi meira av lýsi, fiskamjøli og fiskfóðri. Útflutningsvirðið fyri tosk, hýsu og upsa hevur ligið rímiliga støðugt millum 1 og 1,5 milliardir krónur síðani mitt í 90-árunum.

*Mynd 3: Útflutningsvirðið á fiskavørum 2000-2023*




Hyggja vit síðani at fiskavørunum í nøgd seinastu 23 árini, eru eisini stórar broytingar at hóma. Aftur her hava teir fimm høvuðsbólkarnir sveiggjað síðan ár 2000.

Bólkurin 'Makrelur, sild og svartkjaftur' hevur havt størstu útflutningsnøgdirnar síðani 2007 og fram til 2022. Útflutningsnøgdin fyri lýsið, fóður og fiskamjøl er økt við heili 102 prosentum frá 2022 til 2023. Útflutningsnøgdin er farin frá umleið 125 túsund tonsum upp í 252 túsund tons í 2023.

*Mynd 4: Útflutningsnøgdirnar á fiskavørum 2000-2023*




Hagtølini vísa, at stórar broytingar eru hendar seinastu 23 árini, tá ið hugt verður nærri at, hvørjum londum føroysku fyritøkurnar útflyta til.

*Mynd 5: Útflutningsvirðið til teir fimm størstu marknaðirnar 2000-2023*




Meira enn 80 prosent av samlaða føroyska vøruútflutninginum fer til fimm teir størstu marknaðirnir, ES, USA, Stóra Bretland, Russland og Kina. Fyri nøkur fiskasløg er útflutningurin býttur á nógvar ymiskar marknaðirnar, meðan tað fyri onnur er meira miðsavnað á einstøkum marknaðum.

Hyggja vit gjøgnum tíðina eru stórar broytingar farnar fram. Serliga lutfalsligi parturin á ES marknaðinum er minkaður nógv, áðrenn hann seinastu árini aftur er øktur. Russland vaks rættiliga nógv fram til innrásina í Ukraina, fyri síðani at minka nógv. Seinnu árini hevur útflutningurin til USA verið ein størri partur av útflutninginum, meðan útflutningurin til Kina var vaksandi fram til 2020, tá ið korona-farsóttin gjørdi tað trupult at útflyta til Kina.

*Mynd 6: Útflutningur á fiskavørum til teir fimm størstu marknaðirnar í prosentum av samlaða útflutninginum 2000-2023*




## 2.1 Vendið eyguni ímóti Asia

Flestu fiskaútflutningsfyritøkurnar í kanningini vísa á, at Føroyar mugu fáa betri handilsviðurskifti við fleiri lond í Asia.

Tað eru fyrst og fremst fyritøkurnar, sum útflyta alifisk og uppsjóvarfisk, sum halda, at marknaðaratgongdin til asiatisku londini eigur at betrast. Í fleiri asiatiskum londum er marknaðurin stórur fyri laks og makrel. Eisini verður útflutt fitt av svartkjafti til Asia.

Útflutningsfyritøkurnar nevna ítøkiliga Kina, Suðurkorea, Japan og India sum áhugaverdar marknaðir. Hetta er ikki nýtt. Serliga Kina, Suðurkorea og Japan hava verið nevnd aftur og aftur í nógv ár, meðan India er nýtt land á listanum.

*Tollforðingar*

Tað eru fyrst og fremst tollforðingar, sum forða fyri at útflyta meira til Suðurkorea og India, og partvíst eisini Japan og Kina. Hyggja vit fyrst at laksi, er tollurin at útflyta hesin:

- India: 30 prosent ( í einstøkum føri 10%).
- Suðurkorea: 10-20 prosent.
- Kina: 5-7 prosent.
- Japan: 3,5 prosent.

Harumframt kunnu koma onnur gjøld, sum økja um kostnaðin til hesi lond. Hyggja vit síðani eftir til dømis makreli, er tollurin at útflyta hesin:

- Suðurkorea: 10-20 prosent.
- Kina: 7 prosent.
- Japan: 7-10 prosent.

Føroysku fyritøkurnar hava yvirskipað verri – í ávísum førum nógv verri - treytir enn okkara kappingarneytar at útflyta alilaks og uppsjóvarfisk til fleiri altjóða marknaðir.

Noreg og Ísland eru hvør í sínum lagi kappingarneytar hjá Føroyum. Bæði londini eru limir í EFTA, og fríhandilssáttmálin hjá EFTA við Suðurkorea hevur millum annað við sær, at føroysku útflutningsfyritøkurnar mugu rinda nógv meira í tolli, um tær skulu útflyta makrel til Suðurkorea enn kappingarneytarnir úr Noregi og Íslandi. Sama myndin ger seg galdandi, tá ið tað snýr seg um laks.. Eisini her hava norsku og íslendsku fyritøkurnar ein stóran fyrimun, tí tær rinda ongan toll, tá ið tær útflyta laks til Suðurkorea.

Herfyri undirskrivaðu EFTA og India ein fríhandilssáttmála, sum eftir fáum árum strikar tollin á flestu fiskavørum. Aftur her hava Noreg og Ísland vunnið sær væl betri umstøður enn Føroyar at útflyta sínar fiskavørur. Væntandi fara bæði ES og Stórabretland skjótt at undirskriva ein líknandi fríhandilssáttmála við India.

Afturat hesum hava bæði Ísland og Kili ein fríhandilssáttmála við Kina, sum gevur íslendskum og kilenskum fyritøkum tollfrían útflutning av fiskasløgum sum makrel og laksi til Kina. Eisini í hesum føri er talan um ein greiðan fyrimun í mun til føroysku fyritøkurnar.

Í mynd 7 og mynd 8 síggjast dømi um, hvussu nógvan toll, fyritøkur í Føroyum og hjá okkara kappingarneytum skulu rinda, tá tær útflyta laks og makrel til Suðurkorea.

*Mynd 7: Dømi um hvussu nógvan toll Føroyar, Noreg, Kili, ES og Bretland skulu rinda, tá ið laksur skal útflytast til Suðurkorea.*

| LAKSUR | **Føroyar** | Noreg | Kili | ES | St. Bretland | Kanada |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Heilur, feskur | **20%** | 0% | 0% | 0% | 0% | 0% |
| Heilsur, frystur | **10%** | 0% | 0% | 0% | 0% | 0% |
| Flak, feskt | **20%** | 0% | 0% | 0% | 0% | 0% |
| Flak, fryst | **10%** | 0% | 0% | 0% | 0% | 0% |
| Royktur | **20%** | 0% | 0% | 0% | 0% | 0% |

*Mynd 8: Dømi um hvussu nógvan toll Føroyar, Noreg, Ísland, ES og Bretland skulu rinda, tá ið makrelur skal útflytast til Suðurkorea.*

| MAKRELUR | **Føroyar** | Noreg | Ísland | ES | St. Bretland |
|---|---|---|---|---|---|
| Heilur, feskur | **20%** | 0% | 0% | 0% | 0% |
| Heilsur, frystur | **10%** | 0%/10% [1] | 0%/10% [1] | 0% | 0% |
| Flak, feskt | **20%** | 0% | 0% | 0% | 0% |
| Flak, fryst | **10%** | 0% | 0% | 0% | 0% |
| Royktur | **20%** | 0% | 0% | 0% | 0% |

[1] Tollfrí kvota

Kelda: seafood.no, fríhandilssáttmálar.

At tað júst er marknaðaratgongdin fyri makrel og laks, sum verður samanborin, er ikki av tilvild. Suðurkoreanar eta nógvan makrel og laks, og í útflutningsvirði er Suðurkorea nr. 2 á listanum yvir lond, sum Noreg útflytur mestan makrel til. 3 út av 10 suðurkoreanarum eta laks minst tvær ferðir um mánaðin.

Føroyar hava á ávísum marknaðum somu atgongd fyri okkara fiskaútflutning sum okkara fremstu kappingarneytar. Eitt nú er tollurin til USA og Kanada tann sama hjá Føroyum, Íslandi, Noregi og Kili. Tá ið tað snýr seg um laks, sum verður útfluttur til ES ella til Stórabretland, er tollatgongdin hjá føroyskum útflytarum nakað betri enn tann hjá norskum útflytarum. Nógv tað mesta av okkara botnfiskaútflutningi fer til ES, og har eru sum heild sambærligar kappingartreytir við onnur ES-lond uttanfyri ES, í øllum førum fyri tað slagið av útflutningi, vit hava í dag. Fyri virkaðar/niðursjóðaðar vørur er støðan tó nakað øðrvísi.

### 2.2 Heilsufrøðilig viðurskifti

Marknaðaratgongd fyri vørur er annað enn handilssáttmálar. Eisini kunnu heilsufrøðiligar treytir, sum onnur lond seta føroyskum fyritøkum, ið ætla at útflyta sínar vørur, vera ein avbjóðing. Spurnakanningin vísir greitt, at fleiri føroyskar fyritøkur hava avbjóðingar, sum snúgva seg um vantandi avtalur og váttanir á heilsufrøðiliga økinum.

#### 2.2.1 Betri atgongd til Brasil

Fleiri føroyskar útflutningsfyritøkur svara, at tær vilja sleppa at útflyta fisk til Brasil, sum er fólkaríkasta landið í Suðuramerika. Hetta er serliga galdandi fyri fyritøkur, sum framleiða saltaðar fiskavørur, men Brasil kann eisini vera áhugavert fyri aðra framleiðslu. Brasilski marknaðurin fyri saltaðar fiskavørur er bæði stórur og góður, og tí seta fleiri føroyskar fyritøkur sína vón til, at tað skjótt gerst møguligt at útflyta fisk til Brasil.

Fyrsta stigið til, at føroyski útflutningurin yvirhøvur kann byrja, er ein heilsufrøðilig góðkenning frá matvørumyndugleikanum í Brasil, MAPA. Brasilski matvørumyndugleikin var herfyri á eftirlitsvitjan í Føroyum, og vónandi fer tað at eydnast at fáa heilsufrøðiligu góðkenningina innan ikki alt ov rúma tíð.

Ráfiskakeyparafelagið hevur í nógv ár víst á, at tað er neyðugt við betri marknaðaratgongd, serliga í Suðuramerika, so føroyskir útflytarar hava somu møguleikar sum okkara fremstu kappingarneytar í øðrum londum. Eitt nú hava Noreg, Ísland og Danmark leingi hava havt betri atgongd til at útflyta fiskavørur til Brasil.

**2.3 Betri atgongd til Kina**

Fleiri fyritøkur vísa á ymiskar avbjóðingar við at flyta meira út til Kina. Ein forðing er sonevndi Kinalistin, sum verður mettur at vera ov avmarkaður. Kinalistin fevnir í stuttum um, hvørji fiskasløg kunnu útflytast til Kina og um hvørji føroysk virki kunnu útflyta til Kina. Fyritøkurnar í kanningini nevna fyrst og fremst ymisk fiskasløg, sum tey vilja útflyta til Kina, men sum Kinalistin í løtuni ikki fevnir um.

Samband er millum føroyskar og kinverskar myndugleikar, og útlit eru fyri, at tað fer at gerast høgligari hjá føroyskum fyritøkum at útflyta til Kina. Eitt nú er líkt til, at fleiri fiskasløg kunnu leggjast afturat Kinalistanum.

Føroysku uppsjóvarfyritøkurnar vísa á, at tær hava avbjóðingar, sum teirra kappingarneytar úr serliga Noregi og Íslandi ikki hava. Ein grundleggjandi munur er, at sambært makrelprotokollini kunnu føroyskar fyritøkur bara avskipa til Kina *beinleiðis* úr Føroyum, meðan bæði fyritøkur úr Íslandi og úr Noregi avskipa makrel frá millumgoymslum, eitt nú úr Hollandi. Hetta avmarkar føroysku fyritøkurnar at goyma makrel á goymslu uttanlands, um ætlanin er at senda henda makrel til Kina.

Her er kann leggjast afturat, at Noreg hevur eina sildaprotokol, sum áleggur norskum fyritøkum somu krøv, tá ið tað snýr seg um at útflyta sild til Kina.

**2.4 Aðrar avbjóðingar**

Vilja føroyskar fyritøkur útflyta til Russlands, er tað eitt krav at verða á einum russiskum lista yvir góðkend virki. Tá ið Russland er partur av Evroasiatisku búskaparsamgonguni (EABS), er útflutningur til Russlands formliga útflutningur til EABS.

Eisini er krav um, at alt sum verður útflutt úr Føroyum til londini í EABS, skal fara beinleiðis – uttan nakra millumgoymslu á vegnum. Somu krøv verða ikki sett norskum og íslendskum fyritøkum. Í løtuni er teirra fiskaútflutningur tó sera avmarkaður, tí Russland hevur bannað at innflyta fiskavørur úr hesum londum. Føroyski útflutningurin til Russlands er eisini minkaður nógv.

Fyritøkur hava áður víst á Avstralia sum áhugaverdan marknað. Hetta ger seg galdandi fyri bæði alifisk og saltfisk. Heilsufrøðiligu krøvini eru sera umfatandi at útflyta til Avstralia, serliga aldan fisk, og tí er eingin heilsufrøðilig váttan gjørd við avstralskar myndugleikar. Tað sama ger seg ikki galdandi í mun til saltfisk til Avstralia, og sama um føroyskir útflytarar hava heitt á Heilsufrøðiligu starvstovuna um at gera eina serstaka váttan um saltfisk, eins og Noreg hevur gjørt, so hevur Heilsufrøðiliga starvsstova ikki raðfest hetta enn.

Áhugi er eisini fyrir at útflyta djórafóður úr fiskaúrdráttum til USA. Krøvini, sum amerikonsku myndugleikarnir seta til djórafóður, eru hægri enn til vanligan mat – og av somu orsøk eru krøvini rættiliga umfatandi. Hetta kemst serliga av stóra óttanum fyri sjúku og smittu. Tað er vert at leggja afturat, at bygnaðarliga skipa Føroyar og USA seg grundleggjandi ymiskt á heilsufrøðiliga økinum. Sammett við nógv onnur lond, eitt nú Brasil, veita amerikansku heilsufrøðiligu myndugleikarnir ikki eina samlaða landagóðkenning, men heldur einstakar virkisgóðkenningar.

Tað hava verið aðrar avbjóðingar í sambandi við at útflyta til USA seinastu árini. USA hevur sett umfatandi krøv um at verja havsúgdjór í sambandi við aling og fiskiskap. Tað verður álagt teimum londum, sum útflyta fiskavørur til USA, at prógva, at tey lúka hesi krøv. Eitt ítøkiligt krav er eitt bann ímóti at avlíva havsúgdjór í sambandi við aling og fiskiskap. Um føroyingar skulu útflyta aldan laks til USA, ber sostatt ikki til at avlíva kóp í sambandi við aling, hóast kópurin drepur stórar nøgdir av laksi í føroysku aliringunum. Alilógin mátti tískil broytast, soleiðis at bann varð sett fyri at avlíva kóp í sambandi við aling. Hetta hevur so havt við sær, at kópurin er vorðin naskari. Eisini eru teir blivnir nógv fleiri í tali, og av somu orsøk eru trupulleikarnir av kópinum í alingini vorðnir størri.

## 2.5 Tvørligari at útflyta til Stórabretland

Fleiri fyritøkur nevna, at tað er blivið truplari at útflyta til Stórabretland. At pappírsarbeiðið er blivið rúgvusmikið, síðani Brexit gjørdist veruleiki. Avbjóðingarnar eru samansettar og ymiskar. Millum annað er krav sett um, at allur matvøruinnflutningur skal fráboðast bretsku IPAFFS skipanini. Harafturat krevja bretskir myndugleikar, at allar matvørur skulu innflytast umvegis góðkendar marknaðareftirlitsstøðir í Bretlandi (Border Control Posts) og at serstakar bretskar heilsuváttanir skulu fylgja øllum innfluttum matvørum.

Krøvini, sum bretskir myndugleikar seta, eru komin eftir, at Stórabretland tók seg úr ES. Somu krøv verða sett øðrum londum,  sum útflyta sínar fiskavørur til Stórabretlands.

Bara virki og skip, sum Heilsufrøðiliga starvstova hevur løggildað, kunnu útflyta til Stórabretlands. Fyri at útflyta millum annað laks ella makrel krevst ein heilsuváttan. Vanligur botnfiskur nýtist ikki somu heilsuváttan – men eina fráboðan til bretsku IPAFFS skipanina. Skulu føroyskir útflytarar sleppa undan kravinum um marknaeftirlit í Bretlandi, krevst ein heilsufrøðilig avtala við Stórabretland.  Hetta er i løtuni ikki í umbúna.

## 3. Tænastuútflutningur

Virðið á føroyska tænastuútflutningurin er økt støðugt síðani aldarskiftið. Hyggja vit burtur frá koronaárunum hevur vøksturin verið rímiliga støðugur. Seinastu hagtølini frá Hagstovu Føroya eru frá 2022, og tá táttaði samlaði tænastuútflutningurin í slakar tríggjar milliardir krónur. Flutningur, bæði sjóvegis og loftvegis, eru tann største einstaki tænastubólkurin. Honum á baki kemur bólkurin ferðing, sum í høvuðsheitum fevnir um ferðavinnu.

*Mynd 9: Útflutningsvirðið á tænastum 2000-2022*




Tað hevur verið eitt sindur skiftandi, hvussu nógv tænastuútflutningurin hevur fylt í mun til samlaða føroyska útflutningin. Bulurin í føroyska útflutninginum eru vørur, men tænastur eru eisini ein umráðandi partur eisini. Til dømis í 2022 taldi tænastuútflutningurin 19 prosent,

meðan vøruútflutningurin taldi 81 prosent av samlaða føroyska útflutninginum. Síðani aldarskiftið hava útfluttu tænasturnar svarað til millum sløk 15 prosent og góð 25 prosent av samlaða útflutninginum.

*Mynd 10: Tænastuútflutningurin í prosentum av samlaða útflutninginum 2000-2022*




### 3.1. Tvískattasáttmálar

Tað er ein stór avbjóðing fyri føroyska tænastuvinnu, at Føroyar hava so fáar tvískattasáttmálar við onnur lond. Hetta forðar føroysku vinnuni at taka kappingina upp við sínar útlendsku kappingarneytarnar um arbeiði uttanlands. Tað svara serliga fyritøkur, sum virka í sjóvinnuni.

Tvískattasáttmálar eru altjóða sáttmálar, sum verða gjørdir millum tvey ella fleiri lond við tí endamáli at sleppa undan, at sama inntøka verður skattað tvær ferðir. Sáttmálarnir tryggja at inntøka, ið verður forvunnin og skattað í einum landi, ikki eisini verður skattað í heimlandinum hjá persóni ella fyritøku. Tað kann eisini vera øvugt.

Hesir sáttmálar hava stóran týdning fyri fólk og fyritøkur, ið virka tvørtur um landamørk. Endamálið við einum tvískattasáttmála er eisini at styrkja altjóða handilin og íløgurnar við at skapa størri skattligan tryggleika og rættvísi.

Føroyar eru partur av norðurlendska tvískattasáttmálanum millum Danmark, Ísland, Noreg og Finland umframt sáttmálan við Stórabretland og Norðurírland og við Grønland. Harumframt eru eisini tvískattaavtalur við ymisk oyggjasamfeløg, eins og teir donsku tvískattasáttmálarnir við India og Sveis víðkaðar til eisini at fevna um Føroyar (sí fulla listan her). Hetta avmarkaða talið á tvískattasáttmálum hevur við sær, at føroysk reiðarí ikki eru kappingarfør á nógvum marknaðum.

Javnan hava føroysk reiðarí handilsligar møguleikar uttanlands, har tey sum útgangsstøði eru kappingarfør, men tvørligu skattaviðurskiftini landanna millum ger, at tey missa hetta kappingarførið.

Vantandi tvískattasáttmálarnir hava við sær, at kappingin hjá føroysku fyritøkunum nógvastaðni er ójøvn. Tað hendir tískil javnan, at føroyskar fyritøkur ikki eru kappingarførar, tá ið tað snýr seg um at bjóða upp á arbeiðsuppgávur í londum, sum Føroyar ikki hevur tvískattaavtalur við. Orsøkin er, at føroysku feløgini ella starvsfólkini orsakað av dupultskatting skulu rinda ein hægri skatt enn kappingarneytar okkara, og hetta skapar sjálvsagt ein ójavna í kappingini millum føroysk og útlendsk feløg. Eisini mugu feløgini brúka nógva orku at kanna viðurskiftini í londum, har ongin avtala er. Støðan er tí meira ógreið, og ofta er neyðugt at fáa serliga advokat- og grannskoðarahjálp at fáa greinað viðurskiftini.

Hetta er ein óneyðug avbjóðing, ið minkar um marknaðirnar, sum skipini kunnu virka á. Tað ger tað eisini truplari at vaksa um føroyska flotan.

Ítøkilig dømi eru um føroyskar fyritøkur, sum vóru umbidnar til ein eitt ára sáttmála í Ísrael til eitt av veitingarskipum teirra. Sáttmálin hevði eina dagsúrtøku á 15.000 USD. Við einum valutakursi á 6,80 DKK pr. USD hevði samlaða sáttmálavirðið verið 37.230.000 DKK.

Tá ið Føroyar ongan tvískattasáttmála hava við Ísrael, verða skip og manning skattskyldug í Ísrael. Har er skattatrýstið ávikavíst 23 prosent og 50 prosent fyri skip og manning.
Niðanfyri er ein útrokning, sum vísur verandi støðu við ongum tvískattasáttmála. Eisini er ein útrokning, har støði er tikið í galdandi danska tvískattasáttmálanum.

| | Uttan Tískattasáttmála | Við Tvískattasáttmála | Munur |
|---|---|---|---|
| Virði á kontrakt | 37.230.000 | 37.230.000 | |
| Rakstrarkostnaður | 0 | 0 | |
| Hýra (skattur Ísrael 50% ) | -20.884.529 | -16.065.022 | 4.819.507 |
| FAS Afturbering | 0 | 5.622.758 | 5.622.758 |
| Avskrivingar | 0 | 0 | |
| Fíggjarkostnaður | 0 | 0 | |
| Úrslit áðrenn skatt | 16.345.471 | 26.787.735 | 10.442.265 |
| Skattur Ísrael 23% | -3.759.458 | 0 | 3.759.458 |
| Skattur Føroyar (Tonsaskattur) | -4.914 | -4.914 | |
| Úrslit eftir skatt | 12.581.099 | 26.782.821 | 14.201.723 |

Hevði føroyska fyritøkan tikið av arbeiðnum, høvdu manning og reiðarí goldið tað, ið svarar til 38 prosent av brutto sáttmálavirðinum í skatti til Ísrael. Av somu orsøk varð arbeiðið ikki mett at vera nóg lønandi til at kunna taka kappingina upp við onnur reiðarí í londum, sum hava tvískattaavtalu við Ísrael.

Ein onnur fyritøku í sjóvinnuni hevur í fleiri umførum takkað nei til sáttmálar í USA, tí óvissurnar um skattaútreiðslurnar við ongum tvískattasáttmála hava verið ov stórar. Fyritøkan mælir politisku skipanini til at leggja seg eftir at knýta Føroyar at danska tvískattasáttmálanum við USA, tí metingin er, at tað er nógv tvørligari at gera okkara egna sjálvstøðuga tvískattasáttmála við USA.

Shipping vinnan er ein alsamt vaksandi vinna. Tann 1. januar 2024 vóru í alt 1.616 starvsfólk knýtt at vinnugreinini, bæði á sjógvi og á landi. 1.350 sjófólk eru umborð á skipum undir Reiðarafelagnum fyri Handilsskip, meðan 266 starvsfólk arbeiða á landi.

Reiðarafelagið fyri Handilsskip vil í útgangsstøðinum hava somu marknaðaratgongd og kappingartreytir, sum teirra útlendsku kappingarneytarhava. Tískil vil Reiðarafelagið fyri Handilsskip, at Føroyar gera tvískattasáttmálar við so nógv lond sum gjørligt.

Um Føroyar skulu gera sínar egnu tvískattaavtalur við onnur lond, er hetta uttan iva eitt drúgt arbeiði, og tí er Føroya Arbeiðsgevarafelag í ferð við at gera ein raðfestan lista yvir tey lond, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag metir eru mest átrokandi at gera sáttmálar við. Tó broytist marknaðurin seg javnan og skipini flyta seg hareftir.

**FAKTA: Hvussu kunnu Føroyar fáa fleiri tvískattasáttmálar?**

Hjá Føroyum eru yvirskipað tríggir ymiskir leistir fyri fáa fleiri tvískattasáttmálar undir land.

- **Samráðast beinleiðis um egnar sáttmálar**

Føroyar kunnu beinleiðis fara undir samráðingar við onnur lond.

- **Knýtast at verandi donskum sáttmálum**

Flestu tvískattasáttmálar, sum Danmark hevur við onnur lond, innihalda longu ásetingar um, at tað er møguligt at víðka teir til eisini at umfata Føroyar og Grønland.

- **Samráðast um egnar avmarkaðar sáttmálar**

Føroyar kunnu eisini samráðast um tvískattasáttmálar, sum avmarka seg til bert at fevna um ávísar inntøkur. Sum dømi kan nevnast, at Grønland gjørdi í 2008 ein tvískattasáttmála við USA, sum bert fevnir um inntøkuskatt frá altjóða ferðslu.